## Seks mangladu hjá B68

Hjá EB/Streymi kom tað næstan óvart á, at pappírini hjá pólverska miðvallaranum, Rafal Kwiecinski, komu upp á pláss undan fyrsta landskappingardystinum. Pólverjin var í høgra borði, inntil Teitur Joensen kom á vøllin fyri hann. Pólverjin var einasti nýggi maðurin á liðnum hjá EB/Streymi.

Hjá B68 restaðu seks av teimum, ið verða roknaðir sum evni til besta liðið. Umframt Julian Johnsson og leikbannaðu Øssur Jacobsen og Jóhan Petur Poulsen vóru teir Kristian Anton Andreasen og Magnus Jakobsen (skaddir) og Ralp van Dooren (loyvi ikki komið upp á pláss).

Hansmar Poulsen er fyri stuttum fluttur úr AB – saman við Jóannesi Jakobsen, Magnusi Jakobsen og Súna Fríða Barbá – og til B68, sum hann er uppvaksin í. Niklas Poulsen og Niklas Joensen hava ikki áður spælt á besta B68 liðnum í bestu deildini. Jóhan Dávur Højgaard, sum er sonur gamla B68 toppskjúttan Aksel Højgaard, hevur ongantíð áður verið fremsti maður á besta B68 liðnum.




# EBS slapp óskalað undan trýstinum

*EB/Streymur*

*B68*

**B68 var um reppið at fáa úrtøku, eftir at teir í fyrra umfarinum og undan vindinum høvdu verið undir rættuliga stórum trýsti**

**EB/STREYMUR-B68**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



Í sannari høkjuútgávu vóru uppflytararnir av Toftum á Mølini, har tað við B68 fyritreytunum í huga kundi hugsast, at stórfavorittarnir í EB/Streymi fóru at hava vinnaraliðið úr næstbestu deildini í fjør sum kanónføði.

Fyrra umfarið boðaði frá hesum. Heimamenninir høvdu fríska høgættarlotið undan, og teir vóru støðugt omaná. Tað mesta gekk fyri seg á B68 hálvuni, og gestirnir á Mølini, sum bara høvdu Jóhan Dáva Højgaard, heilt frammi á toppinum, meðan Súni Fríði Barbá var eitt sindur aftanfyri hann, høvdu ilt við at spæla seg nakran møguleika.

EB/Streyma málverjin, René Tórgarð, hevði lítið ella rættari einki at gera. Í hinum endanum vóru fleiri ferðir boð eftir nýggja B68 málverjanum, Tórða Thomsen, sum stóð seg rættuliga væl.

Heimaliðið var í 4-5-1 útgangsstøðu, og Bárður Olsen var serliga eyðsýndur á miðvøllinum, tí tað var hann, sum átti næstsíðsta fótin á báðum málunum. Tað fyrra var Sorin Anghel meistari fyri. Hann var í málteiginum, tá ið hann fekk sendingina frá Bárða Olsen og legði bóltin inn undir málverjan. Hetta var í 19. minutti, og tjúgu minuttir seinni økti høvuðstinni miðverjin Gert Hansen til 2-0, tá ið hann við høvdinum stýrdi frísparksinnleggi frá Bárði Olsen í málið.

EB/Streymur kundi undan hvíldini og undan vindinum havt staðfest trivaligan sigur, men royndin hjá ytsta miðvallaranum í vinstru, Hans Paula Samuelsen, brast í stólpan aftanfyri Tórða Thomsen.

### Komu fyri seg

Eftir steðgin hevði B68 vindin undan, og teir fótaðu sær leikliga. Øssur Hansen, sum hevði verið á vinstra vongverja, varð fluttur fram á miðjuna, og veteranurin fekk tak á spælinum. 2. hálvleikur var lítið korter gamalur, tá ið Súni Fríði Barbá, sum var meiri framrættaður eftir steðgin, við høvdinum sendi hornasparksinnlegg frá Øssuri Hansen úr vinstru í málið

B68 royndi at leggja trýst á fyri at fáa útjavnandi málið. Teir høvdu tveir møguleikar, sum kundu havt givið mál. Í fyrra førinum var EB/Streyma málverjin ikki nóg nærlagdur, tá ið hann misti bóltin eftir Øssur Hansen langskot á tvørtræið. Í seinna førinum var um reppið, at Jann Ingi Petersen var feldur, áðrenn hann spældi upp á tvørs, men bólturin var eitt vet aftanfyri púra leysa Súna Fríða Barbá.

Eisini í 2. hálvleiki hevði heimaliðið, sum lá longriaftarlaga á vøllinum, møguleikar, men Sorin Anghel, men eitt nú Hans Pauli Samuelsen og Arnbjørn Hansen misnýttu úr góðum skotstøðum, og tað eydnaðist heldur ikki Sorini Anghel at fáa mál, tá ið hann hevði møguleikan.

## Tætt at einum stigi

B68 formaðurin, Niclas Davidsen, var ikki heilt illa nøgdur við sínar menn:

– 1. hálvleik eigur heimaliðið. Eftir steðgin saðlaðu vit eitt sindur um. Tað hjálpti upp á spælið, og okkara menn sýndu hugburðin, sum krevst hvørja ferð. Um vit vóru hepnir, so kundu vit havt javnað til 2-2. Tað gjørdu vit ikki, og nú mugu vit taka 2. hálvleik við okkum av Mølini og nýta hann, nu vit fara at fokusera uppá fyrsta heimadystin, sum verður móti GÍ sunnudagin, segði Niclas Davidsen.

## Ikki betri enn næstbest

Egil á Bø er royndasti EB/Streyma maðurin. Hann er nøgdur við at hava fingið stigini, men hann heldur ikki, at leikliga avrikið var so gott, sum tað kundi havt verið:

– Vit høvdu fult og heilt takið í 1. hálvleiki. Tá áttu vit at havt skorað fleiri enn tvey mál. Vit kundu eisini havt fingið fleiri mál í 2. hálvleiki. At vit ikki megnaðu at fáa størri úrtøku kundi havt kostað nógv. Teir fingu eitt mál, og tað hevði einki forgjørt verið í tí, um dómarin fram móti dystarenda

**Annars haldi eg** *Vit vóru í hørðum streymi á Eiði, men bíða bara til vit fáa vindmyllurnar í gongd – Toftamaður*